

*Mynd: Birita Hansen*

## B36 vísti samanumtikið sínar vælskipaðu dygdir, ið fara at gera tað meira enn torført hjá øðrum at stinga av við oddasessinum, havnarfelagið sær út til at halda ógvuliga fast um

at stinga av við oddasessinum, havnarfelagið sær út til at halda ógvuliga fast um. Í góðveðrinum við Løkin vísti alt seg at reka teirra veg, meðan heimaliðið mundi kenna tað, sum stóð stríðið í løtum á fleiri mótum.

### Sera vakurt mál

Fyrri hálvleikur var akkurát komin í helvt, tá vakrasta málið í dystinum fall. Tað var heimaliðið, sum kundi leggja seg á odda, tá fyrst Heðin á Lakjuni av miðvøllinum sendi hart út í vinstru síðu, har Einar T. Hansen setti ferð á og spældi Mamuka Toronjadze leysan inni í brotsteiginum. Við frálíkari skotfintu vann Mamuka seg í fría skotstøðu og høgdi bóltin í málið til 1-0. Ótrúliga væl spælt og væl avsluttað!

Ikki gingu meira enn fimm minuttir, so var brotsspark í hinum endanum. Bólturin kom innfyri úr vinstru síðu, og tá Róaldur Jacobsen fór um koll, peikaði dómarin á brotssparksblettin. Lukasz Cieslewicz, ið ikki var so sjónskur sum í undanfarnum dystum, skoraði trygt til 1-1.

Fleiri mál komu ikki fyri steðgin, hóast møguleikar vóru til tað, men mitt í seinna hálvleiki komu tvey tøtt mál, ið avgjørdu dystin.

Fyrst fekk B36 eitt fríspark úr 20 metra frástøðu mitt fyri, sum Súni Olsen var settur at skjóta. Hann er frísparkssnillingur burturav, og skotið frá honum fór upp um verjumúrin og brast í yvirliggjaran og inn, so B36 nú var á odda 2-1. Sum ikki eina ferð ein perla frá gøtumanninum!

Bara trýggjar minuttir seinni var aftur brotsspark. NSÍ-málverjin, Andras Gango, megnaði ikki at halda einum høgum bólti, og í royndini at fáa fatur á honum aftur, gjørdist hann so grammur, at hann tók Heina í Skorini av fótum. Enn eina ferð slapp Lukasz Cieslewicz at skjóta og skoraði han aftur trygt, so B36 nú var á odda 3-1.

### Kom sera dátt við

Henda knappa vendin í dystinum, sum í veruleikanum kom burtur úr ongum, tóktist koma sera dátt við hjá NSÍ, sum skuldi hava eina drúgva løtu til at fóta sær aftur. B36 hevði onga orsøk til at herja stórvegis á, men legði seg aftur at verja tað, sum nú var vunnið.

Ímóti endanum harðnaði trýstið á B36-málið, og hóast runavíkingar kendu seg snýttar fyri eitt brotsspark og annars høvdu eina rúgvu av vánaligum skotroyndum úr góðum støðum, eydnaðist teimum bara at fáa eitt mál aftrat. Tað kom í yvirtíðini, tá innskifti Árni Frederiksberg smekkaði til, men Meinhardt Joensen bara megnaði at hálvbjargað, so Jústinus R. Hansen kundi geva bóltinum seinasta sparkið inn um strikuna.

Samanumtikið ein dystur, ið livdi fyri steðgin, men í seinna hálvleiki datt púra burtur í einki. B36 er oddalið eftir fyrsta triðingin og kann saktans enda við at vera tað eisini, tá kappingin endar í heyst. Burtursæð frá fýra stigum á muni á stigatalvuni, bendi hinvegin einki á, at NSÍ er minni kappingarneyti hjá oddaliðnum enn frammanundan.

## Súni Olsen er frísparkssnillingur burturav, og skotið frá honum fór upp um verjumúrin og brast í yvirliggjaran og inn. Sum ikki eina ferð ein perla frá gøtumanninum!

# Hepni og hart arbeiði

Eftir tvey verulig rakár er líkt til, at B36 av álvara hevur fótað sær. Nú fyrsti triðingurin av landskappingini er farin aftur um bak, er árstalsfelagið úr høvuðsstaðnum einsamalt oddalið í Vodafonedeildini – og enn hevur liðið ikki tapt nakran dyst.

– Vit eru í gongd við at byggja nakað upp, men sjálvandi er tað super, at tað longu nú gongur so mikið væl, at vit eru oddalið. Hepni er kanska við, men vit hava sanniliga arbeitt fyri tí, so hetta skyldast eisini dugnaskap og hart arbeiði, sigur ein av teimum meira garvaðu spælarunum hjá B36, Jákup á Borg.

Hann var eisini sera væl nøgdur við sigurin í Runavík í gjár, sum staðfesti oddasessin hjá B36:

– Ja, tað sigur seg sjálvt, at vit eru nøgdir. Í fyrra hálvleiki stressaðu teir okkum øgiliga nógv og vóru nógv tað betra liðið, men eg haldi ikki, at teir orkaðu at halda trýstið í seinna hálvleiki, segði Jákup á Borg.

– Sæð yvir allan dystin, var tað kanska ikki óuppiborið, at vit vunnu, sjálvt um teir vóru nógv betri enn vit í fyrra hálvleiki. Vit runnu ikki so nógv aftaná í seinna hálvleiki, og eg haldi, at vit tá bæði mentalt og fysiskt høvdu yvirskot.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Floytaði í so nógv

– Hetta var ein fínur dystur hjá okkum, tí vit kempaðu ófýrt og spældu væl, serliga í fyrra hálvleiki, segði liðformaðurin hjá NSÍ, Christian Høgni Jacobsen, ið tók soleiðis saman um dystin ímóti B36:

– Í seinna hálvleiki brúktu vit kanska í so nógva tíð uppá at skelda ein dómara, sum floytaði í so nógv, og tað kom í síðsta enda at kosta okkum sigurin. Eg tími ikki at koma inn á tað, tí Ransin í Runavík, tað er sum tað er.

Hóast hesin fyrsti veruligi toppdysturin í ár endaði við tapi, er Christian Høgni Jacobsen nøgdur við tað, sum NSÍ hevur fingið burtur úr fyrstu níggju landskappingarumførunum:

– Vit hava fingið 17 stig í fyrsta triðinginum, sum er rættiliga gott, so vit eru væl nøgdir við kappingina higartil, segði hann.

*hilmarjan@sosialurin.fo*